# Tiltøk

**Gudstænastur 25. juli**
**Havnar kirkja:** kl. 11 stud.teol. Ragnhard Petersen og Uni Næs
**Vesturkirkjan:** kl. 11 Derhard Jógvansson
**Hoyvík:** kl. 11 Henning Bøgesvang, barnadópur
**Nólsoy:** Kl. 12 Sonja Klein, altargongd
**Kirkjubøur:** kl. 11 Heri Joensen
**Christianskirkjan:** kl. 11 Petur O.K.Olofson
**Norðskála:** kl. 11 Emil Olsen, messa
**Kunoy:** kl. 12 Hanus á Gørðum, verður útvarpað
**Tjørnuvíkar kirkja:** kl. 17 Henning Bøgesvang
**Vágur:** kl. 11 Patrick de Neergaard
**Eldrasambýlið í Vági:** kl. 14 Patrick de Neergaard
**Kvívík:** kl. 12 Theodor E. D. Olsen
**Á Hellunum:** kl. 11 Niels Pauli Danielsen hevur guðstænastu við altargongd 8. s. e. trin.
**Glyvra kirkja:** kl. 11 Meinhard Bjartalíð.
**Fuglafjørður:** kl. 11 Jákup R. Hansen
**Sandavágs kirkja:** Talvan gongur sunnudagin fyri Sjómansmissiónina

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag messa kl. 17.30 í Kerit. Leygardagin kl. 11.30 messa í Kerit. Sunnudagin kl. 11 hámessa v/Christian Noval, prestur í Mariukirkjuni www.katolsk.fo

**Matiné í Havnar kirkju**
leygardagin kl. 11.30. Marjun Herup Olsen, floyta. Alvi Joensen, gittar.

**Lívdin**
Summarsteðgur. Ongi møtir verða týs- og sunnudagar. Byrjað verður aftur 8. august www.livdin.fo www.ung.livdin.fo

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti (Njál Djhurhuus & Ragnar Ludvig tala)

**Missiónshúsinum við Landavegin**
Sunnukvøldið møti kl. 18 Peter og Annelene Olofsson greiða frá um Tanzania

**Samkoman Immanuel, Brekkutún 5, Hoyvík**
Leygardagin kl. 10 Arbeitt verður uppá nýggja samkomubygningin. Øll eru hjartaliga vælkomin. Sunnudagin kl. 12 Møti. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur. Verið vælkomin.

**Gongutúrur**
Sunnudagin kl. 10 verður gongutúrur: Myrkjanoyrafjall og Kjølur, Klaksvík. Hetta er ein langur og miðal tungur túrur. Havið heit og góð gonguklæðir og ein heitan drekkamunn og matpakka við. Tilmelding á tlf. 302425 ella torsinfo@torshavn.fo

**Samkoman Marknagil Fjalsg. 2, Tórshavn**
Sunnumorgun kl. 10.30 Breyðbróting. Kl. 18 Evangeliskt møti. Mánakvøldið kl. 20 Bønar/uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið í Havn**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Derhard Jógvansson. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Argir, Kirkju- og missiónshúsið**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/Annelisa Joensen

**Kedron, Vágar**
Møtir og tiltøk hjá samkomuni eru at síggja á heimasíðu okkara www.kedron.fo. Øll eru vælkomin í KEDRON. Hevur tú ikki hendan møguleikan, kunna tygum ogna tygum KEDRON-tíðindi.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Onki møti verður sunnukvøldið.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnumorgun kl. 10.30 Møti. Øll hjartaliga vælkomin

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Ingibjørn Royðutoft. Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við ymiskari luttøku. Framførðsla við Júttu Jacobsen. Vælkomin í Kelduna *www.keldan.fo*

**Kambsdalur, Handilsskúlin**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting Týskvøldið kl. 20 Bønar-og uppbyggingarmøti.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnukvøldið kl. 18 verður møti við Petur Adrian og Arna Vatnhamar. Meiri kunning á www.leirvikar.fo Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Hvannasunds skúli**
Møti verður sunnukvøldið kl 18. Justinus Poulsen talar. Øll eru vælkomin

**KFUM & K í Klaksvík**
Sunnudagin kl. 17.30 Bønarløta. kl. 18 Møti við Jákup E. Petersen. Kl. 21 Ungdómsmøti.

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøldið kl. 18 møti. menninir hava orðið. Mánakvøldið kl 20 bønarmøti.

**Getsemane Stangaskákið 1, Klaksvík**
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15-7.00 Morgunbøn Sunnukvøldið kl. 18 Møti Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti v/breyðbróting.

**Aglow Suðuroy**
Møti fyri kvinnur og menn verður í Fylking á Tvøroyri leygarkvøldið 24/7 kl. 19.30. Elice og Paul Hallett luttaka, hon er í Aglow leiðslu í Århus og bæði virka tey í Nýsælandi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnukvøldið kl. 18 verður møti við Ragnar Mortensen og øðrum. Øll eru vælkomin

**Frelsunarherurin Vágur**
Sunnukvøldið kl. 18 møti, vitjan av Ellice og Paul Hallett úr Álborg. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið Libanon í Sørvági**
Sunnudagin kl. 16 verður útimøti við vitnisburðum á Stakka í Sørvági. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.libanon.fo

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*Tlf: 316491/286491*
*tilhald@torshavn.fo*
Tilhaldið er afturlatið frá 1. juli-27. juli og frá 2. aug.-13. aug. Báðir dagar íroknaðir.

**Ólavsøkuframsýning í Tilhaldinum 2010**
Veghæddin:
Summarsprell: Beinta K. Mouritsen, Fríðgerð í Lið, Laila av Reyni og Inga M. V. Svínoy. Allar sniðgevarar.
Kjallarin:
Framsýning av fotomyndum úr myndasavninum hjá Jákup Andreas Arge.
Opið er:
28-29. juli kl. 16-20.
30-31. juli og 1. aug. kl. 14-18.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Listasavnið á Sandi**
*Listasavnið er opið týsdag til sunnudag kl. 14-16.*
*Mánadag er stongt.*
Annars er opið eftir nærri avtalu, ið fæst við at ringja til Listasavnið á Sandi á tlf. 211924. Atgongugjald kr. 40,-

**Bygdatúrur í Skopun við Jens Marius Hentze**
Ætlanin er at gera ein spennandi bygdatúr runt í Skopunar bygd sunnudagin 1. aug. kl. 14-16. Byrjað verður niðri á kaiini og ætlandi varir túrurin 2 tímar. Nógv forvitnisligt verður tikið fram úr bygdasøguni í Skopun. Meira kunning fæst á tel. 253519. Teistin siglir av Gomlurætt kl. 13.15 og úr Skopun aftur kl. 16.30 og 18.30. Norði á Torginum verður kaffi og vaflir serverað! Túrurin kostar kr. 80/-
*Sandoyar Kunningarstova*

**Tilhaldið Hugnin**
Tilhaldið Hugnin í Sandoynni stongt vegna summarfrí.

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
er í summarfrí. Lýst verður nærri, tá tað letur upp aftur.

**Pensionistafelagið í Havn**
*Limirnir koma saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst. Tlf. 222733 finnurj@post.olivant.fo*

**Dagtilhaldið í Gøtubrá**
Vit eru farin í summarferiu.

**Dagtilhaldið í Fuglafirði**
Vit eru farin í summarferiu.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í líkaviku frá kl. 15 til 18. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Eldrafelagið Nón**
Opið hús mánadag til fríggjadag kl. 14.30-17.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
*dagtilhaldid@post.olivant.fo*
*Opið er: Mánadag til hósdag kl. 13.30 – 17.30*
Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks. Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a. Hvør dagur endar við andakt og sangi. Øll vælkomin.

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Opið er týsdag og hósdag frá kl. 14-18. Øll eldri eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Vági**
er farið í summarfrí. Byrjað verður aftur í september.

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Sofíu Haraldsen, tlf. 332741 ella nevndarlimunum.

**BERIN – Sjálvhjálparbólkar**
fyri børn og ung, ið hava mist foreldur ella systkin. info@berin.fo - www.berin.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Teknað teg sum náttarravn ella gang ein royndartúr. Ring tlf. 212498 Daisy, 274696 Barbara, 224048 Óluf

**Spælistovan**
í Margarinufabrikkini. Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9-12 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.

**Vitjunarvinir**
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10
Postsmoga 1015
110 Tórshavn
Tlf. 319630
Redcross@redcross.fo
www.redcross.fo
Fyriskiparir í Tórhavn: Eyrith 313784 - 513784 og Marin 314333 - 284333.

**Giktafelag Føroya**
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
100 Tórshavn. Tlf: 310237
Opið er týsdag og hósdag frá 13 til 16.

**Lymfødemfelagið**
Tlf. 225224
Íslandsvegur 10 C, Tórshavn
Postrúm 2113, FO-165 Argir

**Cøliakifelag Føroya**
Formaður er Henning Sørensen, Garðsgøta 3, Argir, tlf. 314783.
Postboks 3120, 110 Tórshavn,
hjartafelag@hjartafelag.fo

# Brúdleyp

Kjartan Martin Højgaard og Pernille Møller Nielsen *viet* i Give Kirke den 10.07.2010.

Leygardagin 24. juli giftast Guðrun Ólavsdóttir, Strendur og Marius Joensen, Skála. Vígslan verður í Sjóvar kirkju kl. 15. Brúdleyp verður fyri innboðin í Bygdarhúsinum á Strondum kl. 18.30.

Leygardagin 24. juli kl. 12 giftast Sara Lundorff Fekih & Hávardur karlonson Winther í Hoyvíkar kirkju. Øll eru hjartaliga vælkomin til vígsluna og aftaná verður kaffi í kirkjuhølinum. Kl. 17.30 verður veitslan hildin á Hotel Føroyum fyri innbodnum.

24. juli giftast Maja Josenius og David John Whale, Norðragøta. Vígslan verður í Gjáar kirkju klokkan 13. Døgverða verður fyri innboðnum í Høllini, Hotel Hafnia kl. 18. Aftaná kl. 20.30 eru familja, vinir og arbeiðsfelagar hjartaliga vælkomin til eina hugnaløtu í Høllini.

Leygardagin 24. juli kl. 15 giftast í Havnar kirkju Arnbjørg Danielsen, Tórshavn, og John Petersen, Skála. Brúdleyp verður fyri innboðin.

Leygardagin 24. juli kl. 15 giftast í Fuglafjarðar kirkju. Palma Abrahamsen Petersen og Jákup Helgi Egholm. bæði ætta úr Fuglafirði búsitandi Runddyssen 300 9230, Svenstrup. Brúdleyp verður fyri innbodnum á Resturant Muntra kl. 19.

Leygardagin 24. juli giftast Vivian Tausen og Jens Kjartan Feilberg. Vígslan verður í Fuglafjarðar kirkju kl. 13. Veitslan verður hildin á Gjáðargarði kl. 19 fyri innbodnum.

Leygardagin 24. juli giftast Eivi Jartrud Klæmintsdóttir úr Norðragøtu og Bárður Holm úr Leirvík. Vígslan verður í Gøtu kirkju kl. 14. Vælkomst verður á Torbjarnargøtu 15 í Norðragøtu frá kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 24. juli giftast Annika Hansina Nattestad, Miðvágur og Jón Eli Ole- Jacobsen, Sørvágur. Vígslan verður í Miðvágs kirkju kl. 14, og veitslan verður í Bygdarhúsinum í Miðvági kl. 19.

Sunnudagin 25. juli giftast Berlys Cañas og Stefan Nordendal. Vígslan verður í Fríðrikskirkjuni á Toftum kl. 14. Veitslan verður fyri innboðnum kl. 17. Tey, ið ynskja at gleða okkum á okkara stóra degi, eru hjartaliga vælkomin til opið hús í Kongshavnar Kvinnufelagshúsið á Glyvravegi 625. Glyvrar frá kl. 21.

Sunnudagin 25. juli giftast Turið Johannesen Tórshavn og Ólavur Højgaard Saltangará. Vígslan verður í Glyvra kirkju kl. 12.30. Tey ið ynskja at gleða okkum á degnum eru vælkomin til vígsluna og ábit aftná, til kl. 19, í heiminum Á Norðurhædd 23, Saltangará.

Leygardagin 31. juli giftast Elsa Maria Andreasen, klaksvík og Jógvan Johan Lorenzen, Hvannasund. Vígslan verður í Christianskirkjuni í Klaksvík kl. 14. Veitslan verður fyri innboðnum í býgdarhúsinum í Leirvík kl. 19.

Leygardagin 31. juli giftast Eva Sofía Gardar og Jógvan Olsen, Bæði úr Havn. Vígslan verður í Havnar Kirkju kl. 14. Veitslan verður fyri innboðnum í Starvsmannafelagshúsinum kl. 18.

Leygardagin 7. august kl. 12 giftast í Sjóvar kirkju Hildigunn Ellingsgaard, Strendur og Tróndur Petursson, Skála. Móttøka verður í bygdarhúsinum á Strondum beint eftir vígsluna. Tey, ið ynskja at gleða okkum á okkara stóra degi, eru hjartaliga vælkomin til vígsluna og móttøkuna. Døgurði verður fyri innboðin kl. 19.